Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

# Gleða seg til stevnuna

**Nú nærkast av álvara til ársins triðju stevnu – Eystanstevnuna í Runavík. Henda stevna hevur nógv ár á baki, og spurningurin er enn einaferð, um hon hevur sama áhuga millum runavíkingar og eysturoyingar í dag sum áður. Tann spurningin settu vit okkum at kanna. Inni í handlinum Brotið í Saltangará hittu vit seks av viðskiftafólkunum teirra. Spurningurin til teirra var hesin: *Gleðir tú teg til Eystanstevnu í ár?***



*– Eg verði ikki heima hetta vikuskiftið.*

*Ólavur Højgaard, Saltangará*



*– Ja. Eg eri serliga spent til 10-mannafarsróðurin og hvussu tað fer at ganga Eysturoyingi. Annars gleði eg meg til fótbóltin og lívið í býnum. Og so vóni eg, at tað verður sól.*

*Mona Langgaard, Saltangará*

*– Ja, eg gleði meg til stevnuna, serliga til fótbóltin.*

*Anja Mortensen, Runavík*






*– Ja, eg gleði meg til kappróðurin.*

*Elvin Weihe, Saltangará*





*– Eg var ikki heima í fjør, so eg gleði meg til stevnuna í ár.*

*Marita Johannesen, Toftir*

*– Tað er serliga allan fimleikin hjá STØKK, ið eg gleði meg til. Og sjálvandi eisini til karnevalið.*

*Dagbjørt Sólheim, Saltangará*

